# ARI VIÐ MANÉR



## Kv. finalurnar

Leygardagin:

**Fleyr - Mjølnir** 1-3
(21-25, 24-26, 25-23, 21-25)

Sunnudagin:

**Mjølnir - Fleyr** 3-1
(25-18, 23-25, 25-17, 25-6)

fyrsta settið, og síðani svaraði Fleyr aftur við at vinna annað sett. Í triðja setti vísti Poulina Øregaard seg sum góðan servara hjá Mjølni, tá hon mestsum einsamøll við einari drúgvari røð av servum fekk settið í posan.

Um hetta var skelkurin, ið beindi fyri Fleyr, skal ikki verða sagt, men í øllum førum hildu kvinnurnar úr Klaksvík fram í sama stíli í fjórða setti, meðan einki vildi ella kundi bera til hjá Fleyr.

### Gott álopsspæl

Grundina undir samlaða sigurin legði Mjølnir leygardagin í fyrru finaluni, sum eisini endaði 3-1, men tó var ein heilt annar dystur. Tá vóru bæði lið væl við og lupu á við fullari megi. Spælarar báðu megin netið brúktu sína slagstyrki og bjóðaðu av, samstundis um ferðin á spælinum var nógv.

Fleyr var tó tað av liðunum, ið hevði teir størru trupulleikarnar at dragast við, tí ov nógvir lættir bóltar fóru fyri skjeyti, av tí at móttøkurnar ov ofta ikki vóru nóg góðar. Sjálvt um tað ongantíð ordiliga gjørdist leyst millum liðini, mátti Fleyr bøta fyri fleiri smærri og størri niðurtúrar, ið gjørdu, at spælið ongantíð fekst at hanga nóg væl saman.

Hinvegin var meira stýr á tí, sum Mjølnir gjørdi, og líka sum sunnudagin, var tað Mjølnir, ið megnaði at halda høvdið kalt í avgerandi støðunum. Tí var spælið hjá klaksvíkskvinnunum nógv meira støðugt og trygt, so liðið ongantíð fór í panikk ella veruliga misti tamarhaldið á tí, sum hendi.

Sæð yvir báðar finalurnar, hevði Mjølnir fleiri spælarar, ið veruliga tordu at taka ábyrgd. Í verjuni var Margit Joensen tann brandur, hon kann vera, tá hon er upp á tað besta, og í álopinum løgdu bæði Sofía Purkhús og Birgit Guttesen nógv fyri. Men sum heild var liðspælið største styrkin hjá Mjølni, ið tóktist væl fyri kring allan vøllin, har allar sóu út til at vita, hvør júst teirra uppgáva var.

hilmarjan@sosialurin.fo



*Myndir: Álvur Haraldsen*

## Smílandi systrar

**Hilmar Jan Hansen**

Millum spælararnar hjá Mjølni eru systrarnar Purkhús, 18 ára gamla Sofía og 20 ára gamla Elisabeth, sum eisini eru tær báðar hægstu á liðnum við ávikavist 180 og 181 sentimetrum. Tær vóru báðar eitt stórt smíl, tá føroyameistaraheitið var komið til høldar.

– Eg veit ikki, um vit høvdu væntað at vunnið tvær ferðir 3-1, men tað var nakað soleiðis, vit høvdu vónað, at tað skuldi gangast.

Tað var harðari at spæla seinna dystin, tí tað merktist, at vit høvdu spælt dagin fyri, men eg haldi, at vit vóru betri allan vegin ígjøgnum, segði Sofía, ið fekk uppbakking frá eldru systrini, Elisabeth:

– Ja, vit trúðu uppá, at vit skuldu vinna, alt riggaði bara og koyrdi, sum tað skuldi. Hetta er heilt fantastiskt og vit eru ordiliga glaðar. Sjálvt um tað er sunnukvøld, so skal tað feirast, tí Marjun (Kalsø, blðm.) hevur bjóðað okkum í ball.

hilmarjan@sosialurin.fo

## Stórt skuffilsi

**Hilmar Jan Hansen**

Einki var at siga til, at kvinnurnar hjá Fleyr vóru sera skuffaðar, tá tað í gjár stóð greitt, at einki føroyameistaraheiti kom til høldar á hesum sinni. Nógv stóð á fleiri teirra, tí tær høvdu jú givið alt, men rukku kortini ikki á mál, so Fleyr kundi fáa fyrsta meistaraheitið síðani 1997.

– Vit eru sjálvandi sera skuffaðar, men av tí at vit spældu av hundanum til, er hetta tann rætti vinnarin í dag. Og eina ella aðrastaðni eri eg allíkavæl nøgd við silvur. Vit hava verið øgiliga góðar ígjøgnum kappingarárið, men í finalunum fann Mjølnir sítt besta spæl fram – og tað gjørdu vit ikki, segði 20 ára gamli liðformaðurin hjá Fleyr, Rakul Dalsgaard Jakobsen.

– Mjølnir spældi øgiliga væl í fyrra dystinum, og vit gjørdu heldur ikki so nógvar feilir, so tí kundi tað lata seg gera hjá okkum í dag. Men tá vit bara spældu eitt gott sett í seinnu finaluni, kundi tað ikki bera á mál hjá okkum.

hilmarjan@sosialurin.fo